

# Tónleikur og stjørnur í vikuni:
# Stjørnur, Sheryl Crow og Teitur

**Stjørna í eitt kvøld - finalan**
Stóra finalan í sendingini Stjørna í eitt kvøld verður 5. desembur kl. 19.00.
Hvørt fríggjakvøld í fleiri vikur hava fleiri luttakarar roynt at sungið seg í finaluna, sum verður í Forum, har umleið 7.000 áhoyarar fara at seta seg til rættis. Tað er her at avdúkað verður, hvør skal gerast stjørnan yvir øllum stjørnum. Á pallinum fara teir seks finalistarnir at kappast og eisini syngja tónleikabólkar uttan úr heimi. Høvuðsnavnið er uttan iva írsku Westlife. Verturin er sum vant Natasja Crone og føroyski hyggjarin kann eisini atkvøða fyri sínum yndissangara við at ringja 0045-70 30 10 10.

**Sheryl Crow á VH1 og BBC Prime**
Men til eina heilt aðra tónleikastjørnu, ið eisini verður at síggja og hoyra á tveimum rásum í hesi vikuni.
5. desembur er hon tónleikagesturin hjá Parkinson á BBC Prime. Og í konsert-sendingini hjá VH1 verður sent frá konserttúri hjá Sheryl Crow. Her er hon á palli saman við vinum, kendum tónleikarum sum t.d. Eric Clapton og Keith Richards. Sheryl Crow bleiv heimskend við útgávuni, "Tuesday night music club". Og herfyri kundi hon geva eina savnisfløgu við sínum bestu løgum á, "The very best of Sheryl Crow".
Í 1986 kom hon til Los Angeles við eini uppsparing og sannføring um at hon skuldi gerast tónleikari. Við góðum tónleikaevnum bleiv hon kend og væl dámd millum tónleikarar sum ein góður tónleikari og sangskrivari. Síðst í 80´unum arbeiddi hon saman við Bob Dylan, Eric Clapton og Stevie Wonder. Í eitt hálvt ár var hon sangarinna á konserttúrinum, Bad Tour, hjá Michael Jackson. Men hennara fyrsta útgáva kom so út í 1993. ikki fyrr enn eitt ár eftir, í 1994, gjørdi hendan fløgan um seg, stakfløgan "All I Wanna Do" náddi heilt uppá topp fimm bæði í Bretlandi og USA. Hon hevur útmerkað seg við at viðgera trupul evnir í sangum sínum, har teksturin er væl innpakkaður í eitt væl fangandi lag. Tekstirnir eru fyri tað mesta skrivaðir í fyrsta persóni - eitt eyðkenni fyri tónleikarar innan sjangruna "Singer-Songwriter".

**Tei-tour - SvF á konsertferð við Teiti Lassen**
Eftir undirskriftina á sáttmálan við risaplátufelagið Universal Records og fløguútgávuna Poetry and Aeroplanes hevur Teitur verið á konsertferð í USA.
Hetta, at ferðast, hevur merkt lívið hjá føroyska tónleikaranum nógv í seinastuni og somuleiðis merkir hetta, at ferðast, lívið hjá stjørnum av øllum ymiskum sløgum.
Sjónvarpið hevur verið og vitjað Teit yviri í statunum. Í sendingini fær hyggjarin eina mynd av, hvussu lívið er, tá dreymir gerast veruleiki. Sjónvarpið er við á konsertferðini í fýra ymiskum statum og eisini, tá fløgan verður promovera.
Hendan føroyska sendingin, sum Barbara Samuelsen hevur lagt til rættis er ein serlig sending - hon snýr seg jú um føroyskan tónleikara, ið hevur spælt seg inn í arkivini hjá kendu tónleikaútbjóðarunum MTV og VH1.
Við einum tónleikaligum áhuga fyri m.ø. R.E.M, Suzanne Vega og jass tónleikarum sum Miles Davis og John Coltrane er Teitur tónleikaliga vaksin upp í Tórshavn, men longu sum 17 ára gamlur fór hann út í heim at gera meira burturúr tónleikinum. Teitur er ein føroyskur tónleikari, ið er komin sera langt og tónleikaferðin er als ikki komin at einum enda.

**Fakta**

**Stjørna í eitt kvøld - finalan, fríggjakvøldið 5. kl. 19.00 á SvF**

**Sheryl Crow á Parkinson, leygarkvøldið 6. kl. 19.30 á BBC Prime**

**Tai-tour - á konsertferð við Teiti Lassen, sunnukvøldið 7. kl. 20.00 á SvF**

**Sheryl Crow & Friends, mikukvøldið 10. kl. 20.00 á VH1**








VARPIÐ